# Mentamálaráðið

**Lógartænastan**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 20. juni 2019 |
| Mál nr.: | 19/00350 |
| Málsviðgjørt: | HZH/TH |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um felagsreglur í yrkisnámi fyri næmingar, sum byrja útbúgvingina skúlaárið 2013/2014 ella seinni, sum broytt við kunngerð nr. 110 frá 10. desember 2014.**
(Skúlaskeið)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 83 frá 4. juni 2013 um felagsreglur í yrkisnámi fyri næmingar, sum byrja útbúgvingina skúlaárið 2013/2014 ella seinni, sum broytt við kunngerð nr. 110 frá 10. desember 2014, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Heitið á kunngerðini verður orðað soleiðis:
“Kunngerð
um
felagsreglur í yrkisnámi”

**2.** § 1 stk. 2. Verður orðað soleiðis:”*Stk. 2.* Í samráð við skúlan avgerð yrkisnevndin, hvussu skúlaparturin fyri tøkniligu yrkisútbúgvingarnar verður skipaður.”

**3.** § 2. Verður orðað soleiðis: “Upptøka til tøkniligu yrkisútbúgvingarnar og handils- og skrivstovuútbúgvingarnar er treytað av, at næmingurin hevur lærusáttmála.
*Stk. 2* Um næmingagrundarlag er fyri tí, kann skúlin gera av at taka næmingar upp tvær ferðir um árið.
*Stk. 3.* Næmingur, sum ikki hevur lærusáttmála, kann verða tikin upp til 1. skúlaskeið, treytað av at hann fyrst hevur staðið fyrireikingarskeið til yrkisútbúgving við nóg góðum úrsliti.
*Stk.* 4. Fyrireikingarskeiðið til yrkisútbúgving er lýst í námsskipan.”

**4.** § 3, stk. 1 verður orðað soleiðis: “Upptøka á útbúgvingarnar nevndar í §1 pkt. 3 og 4 er treytað av, at umsøkjari hevur fráfaringarpróvtøku fólkaskúlans, 9. flokk.”
Stk. 2. verður strikað, og stk. 3 verður til stk. 2.

**5.** § 4 verður strikað.

**6.** § 5 verður orðað soleiðis: “Fyri at verða tikin upp á 2. skúlaskeið í tøkniligari yrkisútbúgving og útbúgving innan handil og skrivstovu, skal næmingurin við nóg góðum úrsliti hava staðið 1. skúlaskeið og hava ein galdandi lærusáttmála.”

**7.** § 6, stk. 3 verður strikað.

**8.** § 8, stk. 1 verður orðað soleiðis: “Almennar lærugreinar skulu geva útbúgvingini fakliga breidd, taka atlit til yrkisøkið hjá lærlinginum/næminginum umframt menna lestrarførleika lærlingsins/næmingsins.”

**9.** § 10 *stk 2.* verður strikað.

**10.** § 17, stk. 1 verður orðað soleiðis: “Í yrkislærugreinunum verður eftir hvørt skúlaskeið framd ein innanhýsis eftirmeting sambært námskipanini fyri ávísu yrkisútbúgvingina.

**11.** § 18 verður orðað soleiðis: “Treytin fyri, at næmingur kann halda fram á næsta skúlaskeiði er, at talmetið fyri innanhýsis eftirmetingina í yrkislærugreinunum, sbrt. § 17, stk. 1, í minsta lagi er 02.
*Stk. 2.* Næmingur, sum ikki lýkur treytirnar í stk. 1 fyri at halda fram næsta skúlaskeið, kann eftir avgerð leiðara útbúgvingarstovnsins og í samráð við læruplássið fáa møguleika at taka skúlaskeiðið ella partar av skeiðnum umaftur.”

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Broytingarnar í § 1, nr. 3 eru tó galdandi fyri næmingar, sum byrja útbúgvingina í august 2020 ella seinni.

Mentamálaráðið, dagfesting

**Hanna Jensen**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Skjal 1**

## Heitið á skjalinum